# Liberalisma ella...

FINNUR HELMSDAL



Bleiv eitt sindur skakkur, tá eg frætti, at Føroya Løgting enn eina ferð hevur avgjørt at nýta skattaborgarans pening til at bjarga privatum ódugnaskapi. Jú, gløggi lesarin hervur longu kollgitt. Sipað verður við hesum til "sokallaðu" bjargingina av Smyril Line, sum varð dømt at fara seks, sjey ferðir á heysin ta løtuna, tá sáttmálin um byggingina av hesari Norrønu varð undirritaður.

At verandi samgonga finnur upp á slíkt, tað undrar tó ikki. Hon hevur ongantíð og fer heldur ongantíð at hava nakað sum minnir um idoelogisk prinsippir. Tað snýr seg um frá hondini í munnin kryddrað við vinartænastum, og so er tann søgan ikki nógv longur.

Men tá ein sær tveir, sum hava verið nógv Harrans ár í handilsvinnuni, báðir liberalistiskir framherjar í føroyskum politikki. Báðir í kommunalum- og annars eisini í landspolitikki. Teir siga báðir við eitt av bløðum okkara, at tað er púra rætt at nýta skattaborgarans pening til at lofta syndarligum ódugnaskapi, sum privatir vinnulívsmenn bæði hava útint og hava ábyrgdina av.

Tí hevur ein hug at spyrja, um hetta við liberalistiskum grundreglum og borgarligum politikki, bert er galdandi, tá privatir vinna pening. Tá tað snýr seg um at rudda upp og káva útyvir, tá kunnu libralistisku grundreglurnar saktans brótast.

Skal ikki fara í æsir við, hvat liberalisma ella liberalistiskur politikkur er fyri nakað. Skal bert nevna tvær meginreglur, sum eitt ótal av føroyskum politikarum hava víst á og hálovað við hvørt givið høvi. Tann mest siteraða reglan er, at vinnan skal fíggja seg sjálva og tí eisini ráða sær sjálvari. Hin er, at almennur peningur undir ongum umstøðum má geva privatari fyritøku møguleikan fyri kappingaravlagandi vinnuátøkum.

Við at avgera at seta pening í Smyril Line hevur stórur partur av borgarligu politikarum okkara so dyggilig brotið og forsyndað seg inn á báðar oman fyri nevndu meginreglurnar.

Í framtíðini er støða løgtingsins ikki tann, at man skal taka støðu til líknandi umsøkn eina aðruferð. Nei støð tingsins er heldur, hvussu sleppur tað undan, at hetta óskilið endurtekur seg.

Smyril Line hevði ikki meira enn fingið peningin, tá felagið kunngerð, at nú skal veruliga satsast upp á at flyta farm. Og standa onnur flutningsfeløg, skipa- sum flogfeløg sum kánus. Og vit staðfesta, at Føroya løgting enn eina ferð hevur átikið sær leiklutin sum tann, ið stuðlar teimum, sum als ikki hava dugað, til at halda fram.

Men handilsmenninir fáa uttan iva sín ágóða av hesum, og teir eru nógvir í tali í løgtinginum.

# Føroyskir arkitektar krevja monopol

JÁKUP EGHOLM HANSEN
Tekniskur stjóri

Tórshavnar kommuna er sum landsins største byggiharri, helst størsti kundi hjá føroyskum arkitektavirkjum. Kommunan rindar hvørt ár fleiri milliónir í samsýning til føroyskar ráðgevandi arkitektar og verkfrøðingar. Hóast hetta finnast nakrir føroyskir arkitektar at Tórshavnar kommunu, fyri í onkrum einstøkum førum at nýta útlendskar ráðgevarar.

**Kunnu ikki geva frámíhjárætt**

Tað skal undirstrikast, at Tórshavnar kommuna sum meginregla ger avtalur við arkitektar, verkfrøðingar og byggivirkir úr Føroyum. Og tað skal eisini undirstrikast, at tað er ongin mannagongd hjá Tórshavnar kommunu í samband við útboð av prosjekterings- ella byggiarbeiðum, sum ger møguleikarnar hjá føroysku virkjunum verri at fáa uppgávur. Samstundis er heldur ongin mannagongd sum ásetur, at føroyskir arkitektar, verkfrøðingar og byggivirkir skulu hava framíhjárætt í mun til útlendskar ráðgevarar. Og tað er júst hetta sum hevur fingið ilt í nakrar føroyskar ráðgevarar. Teirra útsagnir geva eina greiða fatan av, at føroyskir ráðgevarar halda tað verða ein sjálvfylgja, at teir fáa monopol uppá ráðgevarauppgávur í Føroyum, ella í øllum førum ein víðkaðan framíhjárætt.

Hetta ber tó ikki til, tí bæði kommunalpolitikarar og umsiting skulu virka eftir ásetingunum í kommunulóggávuni um, at røkja skattakrónurnar á bestan hátt, og tað ger man neyvan við at geva ávísum vinnugreinum serstøðu.

**Globalur hughurður manglar**

Fyri einum ári síðani høvdu Føroyar vitjan av fyrrverandi amerikanska forsetanum, Bill Clinton, og vóru øll samd um, at hetta setti Føroyar á heimskortið, og at globaliseringin nú eisini av álvara hevði rokkið hertil. Og verður hugsað um fjølbroyttan arkitektur, so hevur t.d. París, sum onkur føroyskur arkitektur nýliga hálovar í blaðgrein, ikki fingið sína serstøðu innan væleydnaðan arkitektur, við bert at nýta franskar arkitektar – tvørturímóti. Har hava arkitektar úr øllum heiminum – eisini úr Íslandi og Danmark – sett síni fingramerki.

Meðan man kann siga, at globaliseringin er galdandi fyri føroyskar byggifyritøkur, sum í fleiri ár hava verið í kapping við útlendskar byggifyritøkur – bæði íslendskar, norskar og danskar – og hava klára seg væl í hesi kappingini og hava ment seg bæði fakliga og fíggjarliga, tí tær hava tikið kappingina upp í álvara, so manglar hesin hughurður í ávísan mun hjá føroyskum arkitektum og verkfrøðingum.

Úttalilsini hjá føroysku arkitektunum og verkfrøðingunum prógva, at teir grundleggjandi eru negativt innstillaðar at kappast við útlendskar teknistovur. Hetta, hóast teirra starvsfólk ofta hava tikið sína útbúgving uttanlands, og hesi ráðgevandi virki áttu tí ikki at verið so bangin fyri at taka kappingina upp. Men tað merkir so eisini, at føroysku virkini viðhvørt mugu tola at tapa eina útbjóðing til eitt útlendskt ráðgevaravirki, sum er tað, ið er hent við t. d. røktarheiminum Yviri við Strond.

Tað er eisini eitt tekin um ein annarleiðis hugburð hjá føroysku arkitektunum og verkfrøðingunum, í mun til føroysku byggivirkini, at føroysku arkitektarnir og verkfrøðingarnir sera sjálvdan aktivt leitað sær samstarv við útlendsk ráðgevaravirki, tá tað er neyðugt, men at tað sum oftast eru útlendsku ráðgevaravirkini, sum takað initiativið og leitað eftir samstarvsfeløgum í Føroyum. Um føroysku arkitektarnir og verkfrøðingarnir ikki broyta sín hugburð til at leitað sær samstarv úteftir, er tað alt ov lætt at teir bert verða uppfataðir sum strámenn. Og vandin er eisini fyri, at føroysku ráðgevararnir fakliga stagnera.

Slíkt samstarv millum føroysk og útlendsk byggivirkir hava vit sæð í fleiri størri prosjektum – t.d. í báðum undirsjóvartunnlunum, og í onkrum førum eru føroysk byggivirkið í t. d. Grønlandi og samstarva við útlendsk byggivirkir, so eisini her eru byggivirkini frammanfyri føroysku ráðgevarafyritøkurnar.

**Fleiri arbeiðir boðin út til bert føroyskar ráðgevarar**

Kommunan hevur havt fleiri útbjóðingar av prosjekteringsuppgávum millum bert føroyskar ráðgevarar seinastu árini. Kann nevna prosjektering av Heilsumiðstøð við Karlamagnussarbreyt, prosjektering av vardum íbúðum á Óðinshædd og rundkoyring við Hvítanesvegin sum dømi.

Kommunan hevur eisini bílagt hópin av prosjekteringsuppgávum frá føroyskum ráðgevum uttan útbjóðing.

Kommunan hevur bjóðað bert eina prosjekteringsuppgávu út í Norðanlondum í ár, og er tað at gera prosjekt til røktarheim Yviri við Strond.

**Seinkingar kosta skattaborgarunum pening**

Tá kommunan skal velja ráðgevarar til ávísar prosjekteringsuppgávur verður mett um umstøðurnar í hvørjum einkultum føri. M.a. verður mett um støðd á prosjektum, kapasitet hjá teknistovum, viðkomandi royndir til tað slagið av prosjektum talan er um, hvørjar royndir kommunan hevur havt av avvarðandi teknistovum, herundir hvussu væl tær hava loyst undanfarnar uppgávur bæði viðv. tíð og kostnaði. Eisini verður mett um støðuna á føroyska marknaðinum fyri ráðgevarar sum heild – tvs. eru føroysku ráðgevaravirkini ovbyrjaði av uppgávum.

M.a. var hetta ein týðandi faktorur tá býráðið fyri knøppum ári síðani avgjørdi at bjóða røktarheimið Yviri við Strond út í norðurlendskari kapping. Hetta, tí at seinastu árini, meðan byggivirksemi hevur verið sera stórt, hevur kommunan ofta uppliva, at føroyskar teknistovur hava ikki havt nóg stóra manning at seta á allar tær uppgávur, tær hava átikið sær. Hetta hevur viðført seinkingar og øktar útreiðslur fyri kommununa. Tá kommunan hevur tikið trupulleikarnar upp í hvørjum einstøkum føri, hava føroysku teknistovurnar sjálvar víst á, sum forklåring uppá at tær fáa ikki yvirhildi tíðarfreistirnar, at tær mangla fólk. Tí er neyðugt hjá kommununi at tryggja sær, at tær teknistovur sum bjóða seg fram og fáa uppgávur, hava neyðugu manningina til hvørja einstaka uppgávu.

Hetta eru ikki annarleiðis treytir enn kommunan eisini setir byggifyritøkunum, sum skulu byggja bygningarnar sum verða bjóðaðir út at byggja.

**ES-reglur**

Tað er alneyðugt at føroysku arkitektarnir og verkfrøðingarnir broyta hugburð. Longu nú hava íslendskir ráðgevar, gjøgnum Hoyvíkssáttmálan, rætt til at bjóða upp á uppgávur í Føroyum á jøvnum føti við føroyingar. Og møguligt víðkað samstarv við eitt nú ES á hesum økið vil viðføra, at Føroyar skulu binda seg til at nýta ES-reglur um útbjóðing. Tá skulu nógvar av teimum størru ráðgevarauppgávunum, sum higartil hava verið latnar føroyskum ráðgevum, bjóðast út í útlandinum eisini.

**Danski vinnarin íslendskan stjóra**

Kappingin um røktarheimið Yviri við Strond var lýst í øllum Norðanlondum, men bert føroyskar og danskar teknistovur bjóðaðu seg fram. Tað eigur kanska at geva føroysku arkitektunum nakað at hugsa um, tá talan er um altjóðaagerð, at danska teknistovan sum vann kappingina hevur íslendskan stjóra. Vildi hetta verið møguligt við tí hugburði sum enn ræður millum nakrar føroyskar ráðgevarar?

Livst so spyrst.

# Tit lótu úrslitini tala!

PÁLL Á REYNATÚGVU
borgarstjóri í Sands Kommunu



**Góðu Sandingar!**

Tað er við stórari virðing fyri fjøldini av Sandingum, at eg eyðmjúkur takki so hjartaliga fyri stuðulin til lista C. á kommunuvalinum í gjár. Ein serlig tøkk og heilsan til tykkum, sum persónliga stóðu mær við lið og afturvaldu meg í kommunustýri, við enn størri undirtøku.

Fari at gera alt eg megni, saman við listanum, í roynd-ini at savna bygdina, og samstarv er ein opin møguleiki frameftir. Samstarvið treytar báðar partar og tað er sjálvsagt at leiðsluábyrgdin eftir kommunuvalið, er á lista C.

Góðu og trúgvu veljarar og vinfólk! Valsigurin er tykkara. Tit eiga alla ávirkanina og vit skulu gera okkara besta at umsita tykkara vald. Góðu stillarar. Túsund takk fyri tykkara framúr góða arbeiðið.

Samstundis vil eg nýta høvi at ynskja Brandi Sandoy, Rúna Winther, Olgu Fossdalsá, Eyðvarði Petersen, Poul Klementsen, og Fríða Nolsøe tillukku við valinum.

Takk til Lis Clementsen, Bjarka Henriksen, og Jógvan Vest, sum gjørdu eitt megnararbeiði, hóast tit ikki vóru vald hesuferð. Tað verður boð eftir tykkara styrki framyvir.

Takki mínum góða vini Tóra Johannessen, varaborgarstjóra, fyri ótrúligan stuðul í truplum tíðum, og fyri væla samstarv.

Ein serlig tøkk til míni nærmastu, sum altíð hava staðið mær við lið.